


Tað slepst ikki undan, at tiltøkini, sum skulu bøta um búskapin, raka øll, sigur Landsstýrið.

Landsstýrið hevur sagt við yrkisfeløgini, at inntøkulógaruppskotini nú bert taka 0,2% av reallønarvøkstrinum, sum annars fer at halda fram í ár og næsta ár við. Og hesin vøkstur er størri enn roknað varð við, tá yrkisfeløgini í fjør gjørdu sáttmálar sínar við arbeiðsgevararnar.

Eisini hevur Landsstýrið víst á, at í figgjarlógaruppskotinum fyri 1987 eru settar av 35 mill. kr. til hægri pensiónir, størri barnafrádrátt og longri farloyvi í sambandi við barnsburð.

Fara at umseta uppskotini til tøl

— Yrkisfeløgini samd um, at hesi sárini skal tíðin ikki sleppa at lekja. Fara at seta serfrøðing at umseta inntøkulógirnar til tøl

Teir politikarar, sum komu við inntøkulógaruppskotunum og samtyktu tey, skulu ikki sleppa at lata tíðina »reinsa« seg. Teir verða í framtíðini, ikki minst í komandi løgtingsvalstríðnum, mintir á, hvussu nógv uppskotini kosta løntakarunum í Føroyum.

Hetta er í stuttum niðurstøðan, umboð fyri 13 yrkisfeløg komu til um vikuskiftið.

Feløgini ætla at seta ein talfrøðing at rokna út, hvussu nógv uppskotini, sum nú væntandi eru vorðnar lógir, kosta fólki. Úrslitini skulu so almannakunngerast so hvørt.

Yrkisfeløgini, sum tilsamans hava einar 15.000 limir, ella veljarar, um ein vil, fundaðust alt vikuskiftið um inntøkulógaruppskotini. Feløgini fýlast á og mótmæla harðliga, at tilik uppskot altið venda »tunga endanum niðureftir«. Tey hava víst á, at tað eru ikki løntakararnir, sum eru atvoldin til stóru uttanlandsskuldina. Tað er tí skeivt, at júst teir skulu sviða fyri hana, verður sagt.

Ongar broytingar

Yrkisfeløgini høvdu fundir bæði við skattanevndina og Landsstýrið um vikuskiftið, men fingu ikki annað burturúr enn, at samgongupolitikarar viðurkendu, at uppskotini venda »tunga endanum niðureftir«.

Tó skal løgmaður sunnudagin hava játtað at leggja spurningin um oljuavgjaldið fyri samgongufund, sum skuldi vera í gjár.

Feløgini hava gjørt nøkur uppskot um broytingar, sum Landsstýrið og tinglimir hava fingið. Tey skjóta upp, at 70 oyru gjaldið fyri brenniolju til húsarhald og bensin skulu lækka samsvarandi hækkingini í prísunum, tað vil siga oyra fyri oyra. Tey skjóta eisini upp, at tollbroytingin ikki skal elva til tollhækking á húsarhaldsvørum, húsarhaldstólum og byggitilfari til bústaðir. Og tey skjóta upp, at serliga innflutningsgjaldið (sum er 22%) lækkar meira enn eykainnflutningsgjaldið (sum ætlaniner at hækka úr 5 í 6%) hækkar.

Eisini prístalið

Harafturat hava yrkisfeløgini kravt, at øll avgjøld fáa árin á prístalið og, at prístalsskipanin aftur fær tað virði, hon hevði sambært prístalslógini frá 1975.

Tey 13 feløgini, sum hava roynt at fingið samgonguna at broytt inntøkupolitikkin, so hann ikki rakar limir teirra so hart, eru Føroya Arbeiðarafelag, Føroya Fiskimannafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, Starvsmannafelagið, Føroya Lærarafelag, Føroya Postfelag, Føroya Handverkarafelag, Føroya Sjúkrahjálparafelag, Føroya Prentarafelag og Føroya Blaðmannafelag.

hd

Fleiri uppskot fyri jól

— Fundur við peningastovnarnar í dag

Uppskotini, sum Landsstýrið legði fram í síðstu viku, eru ikki tey einastu, sum skulu bøta um búskapin í landinum.

Fleiri uppskot koma fyri jól, frættist. Embætismenn í Tinganesi arbeiða við uppskoti um tvingaða uppsparing og uppskoti um lóg, sum skal forða fyri rentuspekulatión.

Rentan verður eisini á skránni á fundinum, sum Landsstýrið skal hava við peningastovnarnar í dag. Sum tað skilst, er ætlanin at heita á teir um at lækka rentuna.

Landsstýrið hevur eisini nevnt fyri onkrum yrkisfelag, at prístalið kann setast aftur á 100 fyri at sleppa undan møguligari lønarhækking 1. oktober. Men hesum hava feløgini avgjørt víst aftur.

hd

Onki nýtt um nýggjan flokk

Spurningurin um at stovna nýggjan flokk, ein arbeiðaraflokk, er sjálvandi komin fram aftur, nú løntakarar ikki kenna seg at hava nakran góðan í Løgtinginum.

Hetta seinasta árið hevur tosið um ein nýggjan flokk verið frammi av og á, tí nógv halda, ongin flokkur longur við røttum kann kalla seg arbeiðaraflokk.

Inntøkulógaruppskotini hjá samgonguni hava staðfest hetta, verður sagt.

Enn eru tó ongi itøkilig stig tikin at stovna nýggjan flokk. Spurningurin er ikki viðgjørdur á fundunum hjá teimum 13 yrkisfeløgunum um vikuskiftið.

Feløgini eru tó samd um at hittast aftur, tá Løgtingið hevur avgreitt uppskotini frá Landsstýrinum.

hd

Ein lítið brúktur
ZX Spectrum computari
við 7 spølum til sølu fyri 1300 kr.
Tlf. 12985

Vikarur
Vegna farloyvi verður søkt eftir vikari til Sørvágs Skúla frá 11. nov. 1986 og fimm mánaðar fram.
Skúlanevndin

Lýsið í **sosialinum**